# Sálarsjúk skulu hava størri viðurkenning

**Í dag fer tann stóra ráðstevnan fyri psykiatriskar sjúkrasystrar av bakkastokki. Yvirskipaða evnið verður familjan hjá tí sálarsjúka, og hvussu hon eisini verður rakt av sjúkuni. Endamálið er at vinna størri viðurkenning fyri sálarsjúkum**

RÁÐSTEVNA
*Stefan í Skorini*



*Jana H. Dalsgaard, formaður í sjúkrasystrafelagnum, og Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, vera við at seta stóru ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í dag*

Árið í ár er Altjóða Sálarheilsuár. Tað hevur heimsheilsufelagsskapurin hjá Sameindum Tjóðum, WHO, gjørt av. Endamálið er at vinna størri viðurkenning fyri sálarsjúkum millum manna.

Sama endamál hevur norðurlendska ráðstevnan, sum byrjar í dag, hósdagin, í Norðurlandahúsinum. Tað er áhugafelagið FPS – Føroyskar Psykiatriskar Sjúkrasystrar – sum skipar fyri ráðstevnuni. Sjúkrasystrar og onnur, ið fáast við hetta slagið av heilsurøkt, eru komin úr øllum Norðurlondunum at vera við.

### Rakar øll

Tá ein persónur gerst sálarliga sjúkur, rakar tað alla familjuna. Hetta er yvirskipaða evnið, sum verður tikið upp til viðgerðar.

Familjan er mangan í stórari kreppu, tá ein persónur brádliga gerst sálarliga sjúkur. Men henni verða ikki givnar nóg stórar gætur, hóast hon eins og sjúklingurin hava tørv á serkønari hjálp.

Alneyðugt er, at støða teirra verður lýst sum ein veruleiki eins og allar aðrar sjúkur, sum kunnu raka okkum menniskju. Tað er eisini týdningarmikið, at viðgerðin ikki bara tekur støði í sjúklinginum, men eisini teimum avvarðandi, sum hava tørv á hjálp.

Vitan, fatan og álit eru lyklaorð, sum eru avgerandi fyri samstarvinum og um familjan gerst ein møguleiki at fáa bata ella ein forðan í at gerast frískur.

Ráðstevnan verður sett hósdagin í Norðurlandahúsinum. Jóhanna Andreasen, formaður í felagnum, fer saman við Janu H. Dalsgaard og Sámal Peturi í Grund at seta ráðstevnuna.

## Filmsfelagið fer aftur undir sýningar

**Filmsfelag Norðurlandahúsins, sum eitur Klipp, fer nú aftur undir at sýna filmar komandi vetrarhálvu. Mánadagin verður lagt fyri við einum norskum filmi**

FILMUR
*Stefan í Skorini*

Seinasta vetrarhálva eydnaðist so væl hjá filmsfelagnum Klipp, at tey aftur í vetur fara at sýna sjey filmar, sum ikki vera at síggja í biografinum.

Skráin er løgd, og fyrsti filmurin verður »Við orku og frægd«, sum er gjørdur í Noregi í ár. Hesin filmurin er ein tann best umtókti filmurin í Noregi í nógv ár, og nógvir føroyingar kenna seg óivað aftur í hesum filminum.

Hann fer fram í einum lítlum fiskivinnubýi har norðuri í landinum. Hetta er ein lýsing av nærsamfelagnum og av teimum einstøku mannalagnunum har.

Annars eru tilsaman sjey filmar á skránni, sum verða sýndir við umleið einum mánaða millumbili. Annar áhugaverdur filmur er tann iranski filmurin Sirkulin, sum lýsir lívið hjá átta iranskum kvinnum í dag. Filmurin hevur ongantíð verið vístur í Iran.

Tveir av teimum sjey filmunum eru ikki norðurlendskir, og hin er amerikanski filmurin um kenda listamannina Jackson Pollock. Ed Harrid hevur leikstjórnað filminum.

Eisini verður ein føroyskur og ein grønlendskur filmur vístur hjá Klipp.

Eins og undanfarna vetur ber til at keypa atgongumerki til einstøku filmarnar, men tað frægasta er kanska at ogna sær atgongumerki til allar filmarnar í senn.

## Óli Holm verji hjá FUR



*Andrea Eldevig úr Fuglafirði, formaður í FUR, útnevnir her Óla Holm, landsstýrismann, til verja hjá Føroya Ungdómsráði*



*Óli Holm við skjalinum, sum prógvar, at hann er verji hjá FUR*

VERJI
*Stefan í Skorini*

Nýggi landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum er nýútnevndur verji hjá Føroya Ungdómsráði, sum er skipaði barna- og ungdómsfelagsskapurin í Føroyum. Óli Holm varð útnevndur verji á umboðsstjórnarfundi í Havn týskvøldið.

Í hesum sambandi handaði Andrea Eldevig, formaður í FUR, Óla Holm gullnálina hjá FUR og eitt skjal, ið prógvar útnevningina.

Uppgávan sum verji fevnir millum annað um at vera talsmaður fyri rættindum hjá børnum og ungum. Hann skal harumframt virka fyri, at mál, sum beinleiðis eru viðkomandi hjá børnum og ungum, verða send FUR til hoyringar.

Føroya Ungdómsráð er felagsumboð fyri 18 landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapir og umleið 60 lokalfeløg. FUR umboðar sostatt flest allar felagsskapir fyri børn og ung, sum ikki eru skipað í Ítróttarsambandi Føroya. Limafelagsskapirnir hjá FUR hava tilsamans 5000 børn og ung sum limir.



# Danir seta 626 milliónir av til Føroya

**Í uppskoti sínum til fíggjarlóg fyri 2002 skjýtur danski fíggjarmálaráðharrin upp, at danir skerja blokkstuðulin til Føroya í 2002 við 356 krónum, eins og føroyingar ynskja**

HEILDARVEITINGIN
*John Johannessen*

Týsdagin legði danski fíggjarmálaráðharrin, Pia Gjellerup, fram uppskotið til donsku fíggjarlógina fyri 2002.

Í uppskoti hennara er heildarveitingin til Føroya sett til at vera 626 milliónir krónur. Sostatt hevur danski fíggjarmálaráðharrin í fyrstu atløgu gingið føroyska ynskinum á møti, um at heildarveitingin skal lækkast við 356 milliónum krónum 1. januar komandi ár.

### Ikki endaligt

Í danska fíggjarlógaruppskotinum verður greitt frá, at avtalan um blokkstuðulin fyri 1999 til 2001 gongur út í ár, og at landsstýrið í brævi til forsætisráðharran 8. juni 2001 hevur skotið upp, at stjórnin og landsstýrið avtala, at blokkstuðulin úr Danmark til Føroya verður ásettur at vera 626 milliónir fyri 2002.

Fíggjarlógaruppskotið greiðir frá, at uppskot landsstýrissins, sum merkir niðurskurð í blokkinum á 356 milliónir, er bygt á yvirtøkurnar 1. januar 2002 av skúlaverkinum og almannamálum. Og út frá hesum hevur danska fíggjarmálastýrið ásett blokkstuðulin fyri komandi ár.

Men í danska fíggjarlógaruppskotinum verður eisini gjørt greitt, at endaliga upphæddin á blokkinum fyri 2002 verður ásett, tá nærri greiða er fingin á stuðulinum frá statinum til tey øki, sum heimastýrið ynskir yvirtaka.

Í mettu útreiðslunum á donsku fíggjarlógini komandi árini er blokkstuðulin settur at verða verandi 626 milliónir krónur fram til 2005, hóast blokkstuðulssamráðingar standa fyri framman, og hóast landsstýrið hevur meldað út, at tað ynskir blokkin skerdan komandi árini.



[Vejledning] [Indholdsfortegnelse] [Bevillingslovpublikationer] [Home]

Indtast et søgeord eller et kontonummer og klik på Søg
Søgetype: Beslægtet Ordret Ordret (store/små bogstaver)

7.32.11 Generelt tilskud til Færøernes hjemmestyre (Lovbunden) [188]

Budgetspecifikation:

| Mill. kr. | 2000 | 2001 | F | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Udgiftsbevilling | 958,0 | 981,9 | 626,0 | 626,0 | 626,0 | 626,0 |
| 10. Generelt tilskud til Færøernes hjemmestyre, L 1010 1998 | | | | | | |
| Udgift | 958,0 | 981,9 | 626,0 | 626,0 | 626,0 | 626,0 |
| 51. Tilskud til udland m.v. | 958,0 | 981,9 | 626,0 | 626,0 | 626,0 | 626,0 |

10. Generelt tilskud til Færøernes hjemmestyre, L 1010 1998 [188]
Staten yder i medfør af hjemmestyreloven et generelt tilskud til Færøernes hjemmestyre. Den nuværende aftale mellem regeringen og Færøernes landsstyre for årene 1999-2001, jf. Lov nr. 1010 1998, udløber ved udgangen af 2001.
Færøernes landsstyre har ved brev af 8. juni 2001 til statsministeren foreslået, at der mellem regeringen og Færøernes landsstyre indgås aftale om,

*Í danska fíggjarlógaruppskotinum fyri 2002, sum danski fíggjarmálaráðharrin legði fram týsdagin, er blokkstuðulin til Føroya settur at vera 626 milliónir krónur í 2002. Tað merkir, at blokkurin verður skerdur við 356 milliónum*

# Bispur hevur fingið munnkurv

**Nýtt kirkjuálit mælir til, at Føroyar verða býttar upp í tvey bispadømi og at kirkjuskatturin verður tvífaldaður, tá kirkjan verður yvirtikin. Hans Jacob Joensen, bispur, hevur sínar meiningar um álitið, men hevur frá donskum myndugleikum fingið greið boð um at tiga**

YVIRTØKA
*John Johannessen*



*Føroya Bispur hevur fingið boð frá donskum myndugleikum um at lata vera við at gera viðmerkingar til yvirtøkuna av fólkakirkjuni*

– Eg havi sjálvsagt mínar meiningar um kirkjuálitið. Men tær fært tú ikki at vita.

Hetta eru boðini frá Hans Jacob Joensen, Føroya bispi, tá hann verður spurdur, hvat hann heldur um nýggja álitið um, hvussu yvirtikna føroyska fólkakirkjan skal skipast.

– Umvegis Ríkisumboðið havi eg fingið boð frá donskum kirkjumyndugleikum um, at eg ikki skal blanda meg í málið um yvirtøkuna av fólkakirkjuni. Eg skal ikki koma við ráðum og eg skal ikki gera viðmerkingar. Og hesi boð má eg halda meg til, sigur Hans Jacob Joensen.

### Tveir bispar

Kirkjuálitið mælir til, at Føroyar verða býttar upp í tvey bispadømi, eitt norðara og eitt syðra. Sostatt skulu vit hava tveir bispar og tvey bispasæti. Mælt verður til, at markið millum bæði bispadømini verður Hórisgøta í Suðurstreymoy.

Tey, sum hava skrivað kirkjuálitið halda, at tað er ein fyrimunur at hava tveir bispar. Tí so kunnu hesir báðir tosa saman um trúðarspurningar. Arbeiðsbólkurin heldur, at hetta tryggjar, at fleiri sjónarmið verða lýst í einum máli.

### Tvífaldur kirkjuskattur

Fyri at fíggja føroysku fólkakirkjuna, mælir arbeiðsbólkurin til, at kirkjuskatturin verður meira enn tvífaldaður úr 0,3 prosentum til 0,7 prosent.

Tað kostar 29,3 milliónir krónur at reka føroysku kirkjuna. Men í verandi støðu rinda danir 13,2 milliónir krónur av hesum. Tá kirkjan verður yvirtikin, gevast danir sjálvsagt at rinda hesa upphædd. Og tí mælir arbeiðsbólkurin til, at kirkjuskatturin verður hækkaður, so vit fáa peningin inn tann vegin.

## Danskur ráðharri fylgir Maritu

**Danska stjórnin hevur gjørt av, at danski vinnumálaráðharrin, Ole Stavad, skal umboða stjórnina til jarðarferðina hjá Maritu Petersen, fyrrverandi løgmanni Føroya**

JARÐARFERÐ
*John Johannessen*



*Ole Stavad, vinnumálaráðharri, umboðar donsku stjórnina, tá Marita Petersen hósdagin verður fylgd til sítt seinasta hvíldarstað*

Fyrrapartin hósdagin kemur danski vinnumálaráðharrin, Ole Stavad, til Føroya.

Ole Stavad hevur eittans ørindi í Føroyum. Hann kemur at fylgja fyrrverandi løgmanni Føroya, Maritu Petersen, til hennara seinasta hvíldarstað. Ole Stavad kendi Maritu Petersen persónliga frá sínum politiska starvi.

Á skrivstovuni hjá danska vinnumálaráðharranum upplýsa tey, at Ole Stavad umframt at vera formelt umboð hjá donsku stjórnini til jarðarferðina eisini umboðar danska Javnaðarflokkin.

Ole Stavad steðgar stutt í Føroyum. Hann fer longu avstað aftur til Danmarkar hóskvøldið.

## Grønlendingar sýna samkenslu

ANDLÁT
*John Johannessen*

Grønlendingar hava djúpa samkenslu í sambandi við brádliga deyða Maritu Petersen.

Hesum boðar grønlendski landsstýrisformaðurin, Jonatan Motzfeldt, frá í samkenslufjarriti til Føroya Landsstýri.

– Vegna grønlendska landsstýrið og alt tað grønlendska fólkið, ynskja vit at vísa okkara djúpastu samkenslu í sambandi við brádliga deyða Føroya fyrrverandi løgmann, Maritu Petersen, skrivar Jonatan Motzfeldt.